# Uttanríkis- og mentamálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 26. januar 2022 |
| Mál nr.: | Skrivið her |
| Málsviðgjørt: | TVR/AJ |
| Ummælisfreist: | 7. februar 2022 |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp**
(Broyting í samansetingini av stýrinum, broytt kringvarpsgjald, prístalsjavning og striking av kærumøguleika)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mai 2010 og løgtingslóg nr. 163 frá 24. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** § 4, stk. 2 verður orðað soleiðis:
“Stýrislimir og varalimir verða tilnevndir soleiðis:

1) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Ítróttarsambandi Føroya. Ítróttarsamband Føroya skal í sínum tilmæli skjóta upp ávikavist limir og varalimir av báðum kynum.

2) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya. Fróðskaparsetur Føroya skal í sínum tilmæli skjóta upp ávikavist limir og varalimir av báðum kynum.

3) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Føroya Ungdómsráð. Ráðið skal í sínum tilmæli skjóta upp ávikavist limir og varalimir av báðum kynum.

4) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá starvsfólkunum í føstum starvi í Kringvarpi Føroya. Kringvarp Føroya skal í sínum tilmæli skjóta upp ávikavist limir og varalimir av báðum kynum.

5) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Kristiligum lurtara- og hyggjarafelag. Felagið skal í

sínum tilmæli skjóta upp ávikavist limir og varalimir av báðum kynum.

6) Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Landsfelag Pensjónista. Felagið skal í sínum tilmæli skjóta upp ávikavist limir og varalimir av báðum kynum.

7) Landsstýrismaðurin tilnevnir eftir egnari avgerð ein stýrislim og ein varalim."

**2.** § 4, stk. 6 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 6.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvussu stýrislimir sambært stk. 2, nr. 1-3 og nr. 5-6 verða valdir, og hvørjar ítøkiligar førleikar hesir hvør sær skulu umboða. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvussu tilráðingin av umboði fyri starvsfólk í Kringvarpi Føroya fer fram, sbr. stk. 2, nr. 4."

**3.** § 7 verður orðað soleiðis:
"Allir likamligir persónar í aldursbólkinum 24 til og við 66 ár við fullari skattskyldu sambært § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt hava skyldu at rinda kr. 150,00 um mánaðin í kringvarpsgjaldi. Skyldan at rinda kringvarpsgjald tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur er fyltur 24 ár. Undantiknir skylduni at rinda kringvarpsgjald sambært 1. pkt. eru persónar, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar.
*Stk. 2.* Skyldan at rinda kringvarpsgjald sambært stk. 1 er kr. 50,00 um mánaðin fyri persónar, sum eru 67 ár ella eldri. Skyldan at rinda kringvarpsgjald tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur er fyltur 67 ár.
*Stk. 3.* Landsstovnar, sjálvsognarstovnar, interkommunalir felagsskapir, kommunalir stovnar og feløg sambært § 5 í løgtingslóg um partafeløg og smápartafeløg (vinnufeløg) rinda eitt árligt kringvarpsgjald til Kringvarp Føroya. Árliga kringvarpsgjaldið hjá løgfrøðiligum persónum sambært 1. pkt. verður ásett eftir samlaðu árligu lønarútgjaldingunum hjá viðkomandi løgfrøðiliga persóni árið undan innkrevjingarárinum, sbr. nr. 1-7:

1) Er samlaða árliga lønarútgjaldið yvir 10 mió. kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 12.000,00,
2) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 7 mió. kr. og 9.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 9.000,00,
3) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 3 mió. kr. og 6.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 8.000,00,
4) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 2 mió. kr. og 2.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 7.000,00,
5) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 1 mió. kr. og 1.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 5.000,00,
6) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 500.000,00 kr. og 999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 2.500,00,
7) er samlaða árliga lønarútgjaldið undir 500.000,00 kr., verður kringvarpsgjald ikki rindað.

*Stk. 4.* TAKS krevur kringvarpsgjaldið sambært hesi lóg inn fyri Kringvarp Føroya. Rindar persónur við gjaldskyldu, og sum er umfataður av lógini, ikki kringvarpsgjaldið, verður rentutilskriving framd. Rentutilskrivingin er 0,7 prosent fyri hvønn byrjaðan mánað. Sama er galdandi fyri skuldskrivaða rentu. Kringvarpsgjald, ið er fallið til gjaldingar, kann verða innheintað við panting. TAKS fremur pantingina eftir reglunum fyri innkrevjing av skattum. TAKS hevur eisini heimild til at innkrevja skuld og innkrevjingarkostnað sambært hesi løgtingslóg við at afturhalda í A-inntøku hjá teimum gjaldskyldugu sambært reglunum um hetta í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt. Kringvarp Føroya

rindar kostnaðin av innkrevjingini av kringvarpsgjaldinum til TAKS.
*Stk. 5.* TAKS kann krevja inn allar upplýsingar, ið eru neyðugar fyri at umsita lógina, frá teimum í stk. 3 nevndu løgfrøðiligu persónum.
*Stk. 6.* Kringvarpsgjaldið sambært stk. 1-3 verður frá og við 1. januar 2023 prístalsjavnað við 2 prosentum. Árlig prístalsjavning áljóðandi 2 prosent kemur í gildi 1. januar á hvørjum ári. ”

**4.** § 23 verður orðað soleiðis:
“Fyrisitingarlig avgerð, ið er tikin av Kringvarpi Føroya, kann ikki kærast til landsstýrismannin.”

**§ 2**

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2022.
*Stk. 2.* § 7 kemur í gildi 1. januar 2023.
*Stk. 3.* Stýrið í Kringvarpi Føroya fer frá 1. juli 2022. Eftir hetta verður nýtt stýri tilnevnt eftir reglunum í hesi lóg.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Málið verður tikið upp, tí mett verður, at tørvur er á at broyta ávísar ásetingar í galdandi lóg um kringvarp. Sambært samgonguskjalinum skal kringvarpslógin endurskoðast. Við uppskotinum verða tí gjørdar broytingar við atliti at val av stýri og kringvarpsgjaldinum. Í sambandi við at tryggja óheftni verður skotið upp, at farið verður frá einum politiskt tilmæltum stýri, eins og tað ikki skal bera til at kæra fyrisitingarligar avgerðir hjá Kringvarpinum til politiska myndugleikan.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Galdandi kringvarpslóg er frá 2006 og seinast broytt í 2015. Í lógini eru ásetingar um bygnaðin við stýri, fíggjarviðurskiftini við kringvarpsgjaldi o.ø., public service-skyldur og sendiloyvi til aðrar kringvarpsstøðir.

Í 2010 var lógin broytt, so talan ikki skuldi vera um tvær “sjálvstøðugar” tíðindaeindir. Hetta var leivd frá tíðini, tá Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya vóru tveir sjálvstøðugir stovnar. Við samanleggingini í 2005 og nýggjum leiðslubygnaði í 2008 við einum tíðindaleiðara varð mett hóskandi at strika “sjálvstøðugar” og eisini at kalla “eindirnar” fyri “redaksjónir”. Public service-sáttmálin ásetir, at tíðindaflutningurin í Kringvarpi Føroya skal vera óheftur av politisku skipanini og seráhugamálum annars og eigur at verða varpaður so sjálvstøðugt og fjølbroytt sum møguligt úr ymsum sjónarhornum í ymsu miðlunum, t.e. í sjónvarpsmiðlinum, í útvarpsmiðlinum og í alnetsmiðlinum. Á deildini Aktuelt skulu í minsta lagi vera tvær tíðindaredaksjónir, sum hava hvør sín redaktør, ið hevur ábyrgd av tíðindadegnum og leiðir redaksjónina. Tíðindaredaksjónirnar skulu virka so óheftar av hvørjari aðrari, sum til ber. Hildið verður, at verandi áseting í lógini um, at tvær tíðindaredaksjónir altíð skulu vera, saman við ásetingunum í public service-sáttmálanum, eru nøktandi. Tískil fevnir uppskotið ikki um broytingar á hesum bygnaðarøki.

Í 2010 var eisini tann broyting gjørd at áseta kringvarpsgjaldið, sum var tongt at húskjum, beinleiðis í lógina, umframt at bøtt varð um innkrevjingarheimildirnar hjá Kringvarpi Føroya. Seinni var eisini ásett, at Kringvarpið kundi flyta møguligt rakstraryvirskot av spæliinntøkum yvir um ár.

Við broyting í 2015 var farið burtur frá at krevja inn kringvarpsgjald frá húskjum, stovnum virkjum til at krevja inn um skattaskipanin hjá TAKS, tá talan er um einstaklingar, og til at krevja inn við støði í samlaða árliga lønargjaldinum, tá talan er um virkir, stovnar, kommunur v.m.

**1.3. Endamálið við uppskotinum**

Ætlanin við uppskotinum er at bøta um trý viðurskifti, sum snúgva seg um bygnað, t.e. val av stýri, kringvarpsgjald og kærur.

**Í fyrsta lagi** er ætlanin at gera nýggjar ásetingar við atliti at bygnaði. Lógin ásetir, at Kringvarp Føroya er sjálvstøðugur almennur stovnur, óheftur av politisku skipanini og stjórnaður av stýri við sjey limum. Ásett er, hvussu stýrið verður valt, og at stýrið er ovasta leiðslan á stovninum.

Síðan skipanin við kringvarpsstýri varð sett í verk í 2007, er nógv hent á miðlaøkinum, og tað er ikki minni týdningarmikið í dag at hava væl skikkað umboð við viðkomandi førleikum til at leiða stovnin í tíðum við nógvum rembingum og broytingum í miðlaheiminum. Miðlaheimurin er margfeldur og merktur av tøkniligari menning og konvergensi ella athalli. Leiðsluroyndir og vitan um miðlaheimin og samspælið millum miðlar og samfelag eru gagnlig til at reka ein public service-stovn sum Kringvarp Føroya skynsamt og mennandi.

Skipanin við stýri verður í uppskotinum tillagað, so stýrið verður minni tongt at politisku skipanini, t.e. at polistiska ávirkanin verður minkað, og tann fólksliga ávirkanin verður styrkt. Hildið verður, at spurnartekn kann setast við, hvussu óheftur stovnurin er av politisku skipanini, tá politisku flokkarnar skulu velja umboð í stýrið.

Stýrið verður í dag sett saman av fýra limum, sum politisku flokkarnir velja, einum limi fyri starvsfólkini í føstum starvi í Kringvarpi Føroya og tveimum limum, sum landsstýrismaðurin velur. Við hesum uppskotinum verða teir fýra politiskt valdu limirnir skiftir út við umboð fyri fýra ymiskar felagsskapir, soleiðis at landsstýrismaðurin tilnevnir fimm limir og fimm varalimir eftir tilmæli frá Landsfelag Pensjónista, Kristiligum lurtara- og hyggjarafelag, Føroya Ungdómsráð, Ítróttarsambandi Føroya og Fróðskaparsetri Føroya. Landsstýrismaðurin tilnevnir sjálvur ein lim. Talið á limum í stýrinum verður sostatt verandi sjey. Tó er uppskotið nágreinað soleiðis, at atlit skal takast at javnstøðu millum kynini, sum ásett er í § 8, stk. 1 í javnstøðulógini, og tískil skulu partarnir við rætti at tilmæla skjóta upp tveir vanligar limir av báðum kynum og tveir varalimir av báðum kynum, so at landsstýrismaðurin kann tilnevna eitt stýri fyri Kringvarp Føroya, sum í størst møguligan mun tekur atlit at javnstøðu millum kynini.

Stýrið verður í uppskotinum sett saman soleiðis:

- Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Ítróttarsambandi Føroya.
- Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Fróðskaparsetri Føroya.
- Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Føroya Ungdómsráð.
- Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá starvsfólkunum í føstum starvi í Kringvarpi Føroya.

- Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Kristiligum lurtara- og hyggjarafelag.
- Ein limur og ein varalimur verða tilnevndir eftir tilmæli frá Landsfelag Pensjónista.
- Landsstýrismaðurin tilnevnir eftir egnari avgerð ein stýrislim og ein varalim.

Landsstýrismaðurin tilnevnir millum allar limirnar formann og næstformann, eins og skipanin er í galdandi lóg.

Sambært § 4, stk. 4 í galdandi lóg skulu stýrislimirnir samlað umboða førleikar, ið fevna um dyggan kunnleika til og innlit í føroysk samfelagsviðurskifti og mentan, fjølmiðlar og fíggjar- og roknskaparviðurskifti.

Í viðmerkingunum til lógina stendur m.a.:
Ásetingarnar eru gjørdar til tess at tryggja, at stýrið hevur teir førleikar, ið krevjast til at hava hægstu ábyrgd fyri einum so sermerktum stovni sum Kringvarpi Føroya. Dyggur kunnleiki merkir í hesum høpi, at viðkomandi hevur útbúgving og/ella drúgvar starvsroyndir innan nevndu øki.

Í uppskotinum verða krøv til førleikar varðveitt. T.e. at teir stovnar og felagsskapir, ið skulu tilmæla limir, skulu taka somu atlit til førleikarnar hjá stýrislimunum.

**Í øðrum lagi** er endamálið við uppskotinum at gera broytingar í kringvarpsgjaldinum. Lógarásetingin um fíggjarviðurskifti snýr seg um inntøkugrundarlagið hjá Kringvarpi Føroya. Virksemi stovnsins verður fíggjað við kringvarpsgjaldi, kunngerðarinntøkum og sponsorering. Lýsingarinntøkur fara í landskassan. Ásett er, hvør hevur skyldu at rinda kringvarpsgjald, og upphæddir eru settar í lógina.

Í galdandi lóg skulu løgfrøðiligir persónar gjalda kringvarpsgjald eftir samlaðu árligu lønarútgjaldingunum árið fyri innkrevjingarárið eftir hesum 7 trins-stiga:

1) Er samlaða árliga lønarútgjaldið yvir 10 mió. kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 12.000,00,
2) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 7 mió. kr. og 9.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 9.000,00,
3) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 3 mió. kr. og 6.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 8.000,00,
4) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 1 mió. kr. og 2.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 7.000,00,
5) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 500.000,00 kr. og 999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 3.500,00,
6) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 100.000,00 kr. og 499.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 2.000,00 ella
7) er samlaða árliga lønarútgjaldið undir 100.000,00 kr., verður kringvarpsgjald ikki rindað.

Í uppskotinum verður stigin broyttur soleiðis:

1) Er samlaða árliga lønarútgjaldið yvir 10 mió. kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 12.000,00,
2) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 7 mió. kr. og 9.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 9.000,00,

3) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 3 mió. kr. og 6.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 8.000,00,
4) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 2 mió. kr. og 2.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 7.000,00,
5) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 1 mió. kr. og 1.999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 5.000,00,
6) er samlaða árliga lønarútgjaldið millum 500.000,00 kr. og 999.999,99 kr., er árliga kringvarpsgjaldið kr. 2.500,00,
7) er samlaða árliga lønarútgjaldið undir 500.000,00 kr., verður kringvarpsgjald ikki rindað.

Í galdandi lóg skal kringvarpsgjald rindast, um samlaða lønarútgjaldið er heilt niður í 100.000 kr. Í uppskotinum skal lønarútgjaldið vera í minsta lagi 500.000,00 kr, áðrenn gjaldskylda tekur við.

Endamálið við broytingunum er at lætta um hjá smærri vinnuvirkjum. Samanumtikið lækkar gjaldið fyri virki, har lønarútgjaldið er minni enn 2 mió. kr. Virki við lønarútgjaldi á 2 mió. kr. ella meira fara at gjalda tað sama sum eftir galdandi lóg.

Í niðanfyri standandi talvu framgongur, hvussu broytingin í inntøkunum verður í 2023, tá ið broytti gjaldstigin og javningin koma í gildi. Samanlagt verður roknað við, at broytingin javnvigar við -113 tkr. í 2023. Í hesum er væntaði fólkavøksturin tikin við í útrokningunum.

| | | | **Broyttur stigi** | | | **Javning 2023:** | **2%** | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | |
| | íbúgvar | íbúgvar | **Gjald** | | | **Gjald** | **Javning** | **Inntøka** | **Inntøka** | **Inntøka** |
| Aldurb. | 2022 | 2023 | áðrenn | | | Prísjavnað | pr. ár kr. | áðrenn | nýggj | Munur |
| 24-66 ár | 27.877 | 28.084 | 1800 | | | 1.836 | 36 | 50.178.600 | 51.562.224 | 1.383.624 |
| 66+ ár | 8.497 | 8.713 | 600 | | | 612 | 12 | 5.098.200 | 5.332.356 | 234.156 |
| | | | | | | | | | | |
| Íalt | 36.374 | 36.797 | | | | | | 55.276.800 | 56.894.580 | 1.617.780 |
| | | | | | | | | | | |
| | Tal á | | **Gjald** | **Gjald** | | **Gjald** | **Javning** | **Inntøka** | **Inntøka** | **Inntøka** |
| Vinnuvirki - lønargjaldingar | virkjum | | áðrenn | Nýggjur stigi | Munur | nýtt | pr. ár kr. | áðrenn | nýggj | munur |
| >10000 tkr. | 139 | | 12.000 | 12.000 | - | 12.240 | 240 | 1.668.000 | 1.701.360 | 33.360 |
| 7000-9999 tkr. | 42 | | 9.000 | 9.000 | - | 9.180 | 180 | 378.000 | 385.560 | 7.560 |
| 3000-6999 tkr. | 158 | | 8.000 | 8.000 | - | 8.160 | 160 | 1.264.000 | 1.289.280 | 25.280 |
| 2000-2999 tkr. | 124 | | 7.000 | 7.000 | - | 7.140 | 140 | 868.000 | 885.360 | 17.360 |
| 1000-1999 tkr. | 231 | | 7.000 | 5.000 | 2.000 | 5.100 | 100 | 1.617.000 | 1.178.100 | -438.900 |
| 500-999 tkr. | 273 | | 3.500 | 2.500 | 1.000 | 2.550 | 50 | 955.500 | 696.150 | -259.350 |
| <500 tkr. | 479 | | 2.000 | - | 2.000 | - | - | 958.000 | - | -958.000 |
| | 1.446 | | | | | | | 7.708.500 | 6.135.810 | -1.572.690 |
| | | | | | | | | | | |
| | Tal á | | **Gjald** | **Gjald** | | **Gjald** | **Javning** | **Inntøka** | **Inntøka** | **Inntøka** |
| Stovnar - lønargjaldingar | stovnum | | áðrenn | Nýggjur stigi | | nýtt | pr. ár kr. | áðrenn | nýggj | munur |
| >20000 tkr. | 94 | | 12.000 | 12.000 | - | 12.240 | 240 | 1.124.308 | 1.146.794 | 22.486 |
| 7000-9999 tkr. | 21 | | 9.000 | 9.000 | - | 9.180 | 180 | 192.738 | 196.593 | 3.855 |
| 5000-6999 tkr. | 56 | | 8.000 | 8.000 | - | 8.160 | 160 | 449.723 | 458.718 | 8.994 |
| 2000-2999 tkr. | 58 | | 7.000 | 7.000 | - | 7.140 | 140 | 402.877 | 410.934 | 8.058 |
| 1000-1999 tkr. | 58 | | 7.000 | 5.000 | 2.000 | 5.100 | 100 | 402.877 | 293.525 | -109.352 |
| 500-999 tkr. | 29 | | 3.500 | 2.500 | 1.000 | 2.550 | 50 | 103.062 | 75.088 | -27.974 |
| <500 tkr. | 32 | | 2.000 | - | 2.000 | - | - | 64.246 | - | -64.246 |
| | 348 | | | | | | | 2.739.831 | 2.581.651 | -158.179 |
| | | | | | | | | | | |
| Íalt | | | | | | | | 65.725.131 | 65.612.041 | -113.089 |

Í niðanfyri standandi talvu, ið vísir framskrivingar fyri tíðarskeiðið 2024 til 2030, er lagt upp fyri væntaðu broytingini í fólkatalinum í nevnda tíðarskeiði. Tað er serliga talið á pensjonistum, sum økist, meðan talið á 24-66 ára gomlum verður nærmast óbroytt. Í framskrivingini er talið á vinnuvirkjum og stovnum óbroytt í tíðarskeiðnum.

| Framskriving 2024-2030 | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | 2029 | 2030 |
| | | | | | | | |
| Fólkatal 24-66 ár | 28.137 | 28.197 | 28.102 | 28.133 | 28.120 | 28.087 | 28.046 |
| Fólkatal 67+ ár | 8.917 | 9.100 | 9.337 | 9.520 | 9.700 | 9.912 | 10.142 |
| | | | | | | | |
| KVF-gjald 24-66 ár | 1.873 | 1.910 | 1.948 | 1.987 | 2.027 | 2.068 | 2.109 |
| KVF-gjald 66+ ár | 624 | 637 | 649 | 662 | 676 | 689 | 703 |
| Inntøka 24-66 ár | 52.692.723 | 53.861.188 | 54.753.315 | 55.909.989 | 57.001.837 | 58.073.642 | 59.148.646 |
| Inntøka 66+ ár | 5.566.348 | 5.794.196 | 6.064.001 | 6.306.510 | 6.554.265 | 6.831.463 | 7.129.782 |
| | | | | | | | |
| | 58.259.071 | 59.655.383 | 60.817.317 | 62.216.499 | 63.556.102 | 64.905.105 | 66.278.428 |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| Vinnuvirki | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | 2029 | 2030 |
| >20000 tkr. | 1.735.387 | 1.770.095 | 1.805.497 | 1.841.607 | 1.878.439 | 1.916.008 | 1.954.328 |
| 7000-9999 tkr. | 393.271 | 401.137 | 409.159 | 417.343 | 425.689 | 434.203 | 442.887 |
| 5000-6999 tkr. | 1.315.066 | 1.341.367 | 1.368.194 | 1.395.558 | 1.423.469 | 1.451.939 | 1.480.977 |
| 2000-2999 tkr. | 903.067 | 921.129 | 939.551 | 958.342 | 977.509 | 997.059 | 1.017.000 |
| 1000-1999 tkr. | 1.201.662 | 1.225.695 | 1.250.209 | 1.275.213 | 1.300.718 | 1.326.732 | 1.353.267 |
| 500-999 tkr. | 710.073 | 724.274 | 738.760 | 753.535 | 768.606 | 783.978 | 799.658 |
| <500 tkr. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| íalt | 6.258.526 | 6.383.697 | 6.511.371 | 6.641.598 | 6.774.430 | 6.909.919 | 7.048.117 |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| Stovnar | 2024 | 2025 | 2026 | 2027 | 2028 | 2029 | 2030 |
| >20000 tkr. | 1.169.730 | 1.193.124 | 1.216.987 | 1.241.327 | 1.266.153 | 1.291.476 | 1.317.306 |
| 7000-9999 tkr. | 200.525 | 204.536 | 208.626 | 212.799 | 217.055 | 221.396 | 225.824 |
| 5000-6999 tkr. | 467.892 | 477.250 | 486.795 | 496.531 | 506.461 | 516.590 | 526.922 |
| 2000-2999 tkr. | 419.153 | 427.536 | 436.087 | 444.809 | 453.705 | 462.779 | 472.035 |
| 1000-1999 tkr. | 299.395 | 305.383 | 311.491 | 317.720 | 324.075 | 330.556 | 337.168 |
| 500-999 tkr. | 76.589 | 78.121 | 79.684 | 81.277 | 82.903 | 84.561 | 86.252 |
| <500 tkr. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| íalt | 2.633.284 | 2.685.950 | 2.739.669 | 2.794.462 | 2.850.352 | 2.907.359 | 2.965.506 |
| | | | | | | | |
| Inntøkur íalt | 67.150.881 | 68.725.030 | 70.068.357 | 71.652.560 | 73.180.884 | 74.722.383 | 76.292.051 |
| | | | | | | | |
| | | | | | | | |
| Øking p.a. | 1.538.840 | 1.574.149 | 1.343.327 | 1.584.203 | 1.528.325 | 1.541.499 | 1.569.668 |
| Pct. p.a. | 2,3% | 2,3% | 2,0% | 2,3% | 2,1% | 2,1% | 2,1% |

Í uppskotinum verður ásett, at kringvarpsgjaldið verður prístalsjavnað. Hetta er neyðugt, so stovnurin fær eitt tryggari inntøkugrundarlag, ið leggur upp fyri árliga prís- og lønarvøkstrinum í samfelagnum. Skotið verður upp at prístalsjavna kringvarpsgjaldið við tveimum prosentum árliga. Kringvarpsgjaldið hevur ikki áður verið javnað, og við javningini fer stovnurin at fáa eina støðugari inntøku í mun til væntaða prís- og lønarvøksturin í samfelagnum.

**Í triðja lagi** er endamálið við uppskotinum at tryggja størri óheftni í mun til politisku skipanina. Eitt nú eiga setanar- og starvsfólkamál hjá Kringvarpi Føroya ikki at kunna kærast til landsstýrismannin, og av somu orsøk verður mælt til at broyta kæruásetingarnar. Stovnurin er óheftur av politisku skipanini og stendur tískil heldur ikki í fíggjarlógini. Landsstýrismaðurin hevur ikki heimildir at geva stovninum tænastuboð, og tískil verður tað ikki mett hóskandi, at landsstýrismaðurin eitt nú kann ógilda fyrisitingarligar avgerðir hjá Kringvarpi Føroya.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Tær tríggjar broytingarnar verða mettar at fara at bøta um týdningarmikil viðurskifti fyri stovnin og borgararnar.

Viðvíkjandi ovastu leiðsluni á stovninum, stýrinum, verður hildið, at tað er ein fyrimunur at skifta tey fýra politiskt valdu umboðini um við umboð fyri viðkomandi stovnar og feløg. Hesi umboð kunnu geva stýrinum eitt fjølbroyttari grundarlag og kunnu vera við til at spegla samfelagslig áhugamál og samfelagsligan tørv. Tryggjað verður, at tað verður lættari at virða ásetingina um, at stovnurin er politiskt óheftur.

Prístalsjavning fer at gera raksturin hjá Kringvarpinum tryggari, við at gjaldið í størri mun tekur atlit at árliga prís- og lønarvøkstrinum.

Mett verður, at tað fer at tryggja óheftni stovnsins at strika heimildina at kæra fyrisitingarligar avgerðir um starvsfólkaviðurskifti o.a. til landsstýrismannin. Eitt stýri er sett at tryggja armslongd til politiska myndugleikan, og landsstýrismaðurin kann ikki geva stovninum tænastuboð. Tað samsvarar tí ikki hesum aðalmálum, at kærast kann til tann politiska myndugleikan.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**

Hesi hava fingið uppskotið til ummælis:

Ítróttasamband Føroya
Felagið Føroysk Miðlafólk
Fíggjarmálaráðið
Fróðskaparsetur Føroya
Føroya Ungdómsráð
Kommunufelagið
Kringvarp Føroya
Kristiligt lurtara- og hyggjarafelag
Landsfelag Pensjónista
Starvsfelagið
TAKS
Vinnuhúsið

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki stórvegis fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur, sum samanlagt í 2023 koma at rinda góðar 150 tús.kr. minni enn eftir verandi lóg. Frá 2023 og árini frameftir fer gjaldið at fylgja vanliga prísvøkstrinum í samfelagnum og verður tískil prístalsjavnað við 2 prosentum um árið.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið kann hava við sær minni umsiting hjá landinum, um kæruheimildin verður strikað. TAKS skal prístalsjavna kringvarpsgjaldið 1. januar á hvørjum ári.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna. Ætlanin er at lætta um hjá smærri vinnuvirkjum við, at gjaldið hjá hesum minkar ella fellur burtur.
Samanumtikið fer vinnan í 2023 at rinda góðar 1,5 mió. kr. minni enn sambært galdandi lóg. Javningin av gjaldinum á 2 prosent um árið frá 2023 er eisini galdandi fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella sosialar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur jaligar avleiðingar fyri smærri løgfrøðiligar persónar, ið fara at rinda minni í kringvarpsgjaldi. Harumframt fer kringvarpsgjaldið hjá øllum likamligum persónum at hækka eitt vet orsakað av prístalsjavningini.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið hevur ikki bindingar til millumtjóðasáttmála, ið gera, at uppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunu-myndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið hevur ikki avleiðingar í mun til Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættingasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

### 2.9. Markaforðingar

Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**

Lógaruppskotið hevur ikki við sær ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, men uppskotið inniheldur, eins og í galdandi lóg, nett somu heimildir til TAKS. Tað er av lógartekniskum ávum, at øll § 7 er tikin við og ikki bert partar av greinini, tí talan er um stórar og týðandi broytingar. Í mun til galdandi lóg verður kortini einki broytt viðvíkjandi heimildunum hjá TAKS at krevja inn.

**2.11. Skattir og avgjøld**

Talan er um ein beinleiðis skatt, tí tað er ikki samband millum ítøkiligu tænastuna og veitingina.

**2.12. Gjøld**

Mett verður ikki, at uppskotið hevur ásetingar um gjøld sum so. Mett verður at kringvarpsgjaldið er ein skattur og ikki eitt gjald, sbr. pkt. 2.11.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**

Uppskotið áleggur likamligum og løgfrøðiligum persónum skyldur at rinda kringvarpsgjald. Eins og í galdandi lóg kann TAKS fáa allar neyðugar upplýsingar til vega, sbr. § 7, stk. 9. Tað er bert av lógarteksnikum ávum, at øll greinin er tikin við og ikki bert broytingarnar.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**

Uppskotið gevur Ítróttarsambandi Føroya, Føroya Ungdómsráð, Fróðskaparsetrinum, starvsfólkunum í Kringvarpi Føroya, Kristiligum lurtara- og hyggjarafelag og Landsfelag Pensjónista rætt til at tilmæla limir í stýrið fyri Kringvarp Føroya. Landsstýrismaðurin missir heimildina at tilnevna tveir limir eftir egnum ynski, men fer við uppskotinum at hava rætt til at tilnevna ein lim og ein varalim í stýrið.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**

Nei.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**

Uppskotið fer at áleggja tilmælandi pørtunum at fylgja ásetingunum í javnstøðulógini soleiðis at skilja, at tey skulu tilmæla limir og varalimir av báðum kynum.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1, nr. 1**
Ásett verður, hvørjir felagsskapir hava rætt at tilmæla limir í stýrið fyri Kringvarp Føroya. Tað eru bert teir tilmæltu persónarnir, ið landsstýrismaðurin kann tilnevna. Sjálvur hevur hann rætt at tilnevna ein lim og ein varalim eftir egnum ynski. Atlit skal havast at javnstøðu, tá ið limir og varalimir vera skotnir upp. Eisini er ásetingin broytt, soleiðis at tað ikki longur verða politisku flokkarnir, sum skulu skjóta upp limir í stýrið. Stýrið skal vera óheft av politisku skipanini men heldur verða meiri breitt og fólksligt.

**Til § 1, nr. 2**
Ásetingin er innihaldsliga óbroytt. Bert tilvísingarnar eru tillagaðar broytingaruppskotinum.

**Til § 1, nr. 3**
Í galdandi lóg skal kringvarpsgjald rindast, um samlaða lønarútgjaldið er heilt niður í 100.000 kr. Í uppskotinum skal lønarútgjaldið vera í minsta lagi 500.000 kr, áðrenn gjaldskylda tekur við. Kringvarpsgjaldið lækkar úr 3.500 kr. í 2.500 kr., um samlaða árliga lønarútgjaldið er millum 500.000 kr. og 1.999.999,99 kr.

Endamálið við broytingunum er at lætta um hjá smærri vinnuvirkjum, soleiðis at gjaldið hjá hesum minkar. Samanumtikið lækkar gjaldið fyri virki, har lønarútgjaldið er minni enn 3 mió. kr.

Frá 2023 og árini frameftir fer gjaldið at fylgja vanliga prísvøkstrinum í samfelagnum og verður tískil prístalsjavnað við 2 prosentum um árið.

**Til § 1, nr. 4**
Sum ein liður í at tryggja størri óheftni í mun til politisku skipanina verður skotið upp at strika kærumøguleikan, soleiðis at eitt nú setanar- og starvsfólkamál hjá Kringvarpi Føroya ikki kunnu kærast til politiska myndugleikan.

**Til § 2**
Lógin kemur í gildi 1. juli 2022, tó kemur § 7 viðvíkjandi gjaldinum ikki í gildi fyrr enn 1. januar 2023. Ásett er eisini, at virkandi stýrið fer frá, tá ið hendan lógin kemur í gildi. Eftir tað skal landsstýrismaðurin tilnevna nýtt stýri sambært hesi lóg.

Uttanríkis- og mentamálararáðið, 26. januar 2022

**Jenis av Rana**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen